# Tíðindabræv úr Grønlandi, juni 2010:

Páll Poulsen skrivar

Godtfred Norðoy og Eyðun í Radiobúðini eru her í sambandi við at gera Juvel sjókáran. Juvel er skrásettur sum ferðamannaskip, so vit kunnu sigla børn til legurnar. Hann hevur loyvi til 27 ferðafólk. Av hesi orsøk er hann dýrur at reka, tí hann skal næstan lúka somu trygdarkrøv sum Norrøna. Hann er nú komin á sjógv og Skipasýnið hevur góðkent bátin uttan viðmerkingar, so hann hevur siglingarloyvi til 20. juni næsta ár.
Tá fólk heitir á okkum, sigla vit leigutúrar, so bátaraksturin kann hvíla í sær sjálvum. Umframt so hevur tann siglingin fíggjað vetrartiltøkini, sum Jørundur hevur havt fyri børn í "spejdarahúsinum", somuleiðis útreiðslurnar til árligu barnalegurnar og eisini sethúsini. Vit kunnu siga, at vit hava verið sjálvfinansierandi, men hinvegin tørvar okkum menn við minst dugnaskapsprógvi at sigla og ein matrós og so menn at viðlíkahalda bátin tekniskt.

Júst hetta er eitt stórt bønarevni. Eyðun og Godtfred hava gjørt hetta í mong ár, men teir eru ikki unglingar longur -144 ár tilsaman ella 72 ár í part! Teir meta ikki, at teir kunnu koma aftur vegna aldur, so tað er eitt stórt evni, at maður skal koma í mans stað. Tað er stórur tørvur á yngri kreftum, so vit kunnu endurnýggja okkum. Vit høvdu sett stóran prís uppá forbøn tykkara fyri júst hesum.

Annars trívist Marjun væl í sínum arbeiði. Tað gevur henni ein góðan innfalsvinkul til fólkið her.
Júst sum eg skrivi hetta, ringdi Eyðun og segði, at Helen hevði verið áhaldsin og brotið armin, so hann noyðist heim beinanvegin. Okkum tørvar sostatt ein matrós – annars noyðist eg at sigla, tað er bara tað, at eg havi so nógv annað at gera júst nú. Um hetta skal eg nevna í komandi bønarevnum.

Vegna okkum øll í Qaqortoq
*Páll Poulsen*